# Ferð til Ísraels í oktober



*Føroyskt ferðalag í Ísrael í fjør*

**Í oktober fer føroyskt ferðalag til Ísraels. Fyrireikararnir siga, at nú tykist at vera friðaligari í økinum, so eisini ber til at vitja í Norðurísrael**

ÍSRAELSFERÐ
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Tað er Frants Jensen og Hilmar Højgaard, ið skipa fyri Ísraelsferðina. Báðir hava fleiri ferðir verið í Ísrael og kenna væl til landið og umstøðurnar har. Tekningarfreistin til ferðina 5. - 16. oktober er nú útsett til 1. september. Sum tað sær út, verður tað friðarligari í økinum, so eisini ber til at fara til Norðurísraels.

Áhugi hevur avgjørt verið fyri Ísraelsferðini í oktober. Nakrar tekningar eru komnar, og rættiliga nógvir fyrispurningar hava verið.

– Nú er bara at skunda sær at tekna seg, tí ein ferð í Heilaga Landinum er eitt minni fyri lívið! Og oktober er eisini ein góður mánaði at ferðast í, tí tá er er ikki alt ov heitt, men meir svalligt, siga fyrireikararnir.

Av tí at tað hevur verið ófriðarligt í Norðurísrael og í Libanon síðstu tíðina ber ikki eins væl til at ferðast í Ísrael, sum tað hevur verið. Men sum tað sær út, verður tað friðarligari í økinum, so ferðalagið eisini kann fara til Norðurísraels. Um tað ikki ber til at ferðast í Norðurísrael, tá ið ferðin skal vera, so verða broytingar í skránni, og ferðast verður meir sunnanfyri í landinum.

Á ferðini í Ísrael verður vitjað á teimum kendu bíbilsku støðunum, so sum í Jerúsalem, Betlehem, Nazaret og við Genesaretvatnið. Eisini verður vitjað við Deyðahavið og á Massada. Í oktober er tann jødiska leyvsalahátíðin, og hetta sleppa føroysku luttakararnir eisini at uppliva. Nógv annað er eisini á skránni. Les meir um Ísraelsferðina á www.israel.fo

# Ein føroyskur skúlanæmingur skal við á rannsóknarferð

**Í samband við Galathea 3 rannsóknarferðina, hava yvir hundrað føroyskir skúlanæmingar úr framhaldsdeild og studentaskúla verið við í eini kapping, har vinningurin er tríggjar vikur umborð á Vædderen á rannsóknarferðini kring heimin**

RANNSÓKNARFERÐ
*Ella Larsen*
*ella@sosialurin.fo*

Endaumfarið í kappingini verður í Norðurlandahúsinum í morgin kl. 14 til 18.30.

Luttakararnir skulu kappast við øðrum í sama aldursbólki. Tað einasta luttakararnir vita áðrenn tey møta upp í morgin, er at tey skulu vera har kl. 14, at tey ikki sleppa at hava fartelefon við, men at tey skulu minnast til at eitt ur.

Luttakararnir hava frammanundan fyrireika eina framløgu, ið skal vara í ein minutt, dómsnevndin skal døma framløguna saman við hinum uppgávunum. Uppgávurnar vera bæði vitanar uppgávur og praktiskar uppgávur, tær eru loyniligar, tí spenningurin um hvussu luttakararnir klára óvantaðar avbjóðingar, er ein partur av kappingini.

Klokkan 18.30 í morgin verður vinnarin kosin í Klingruni í Norðurlandahúsinum. Vinnarin skal umborð á skipið í Perth í Avstralia og fer í land í Sydney tríggjar vikur seinni. Næmingurin verður umborð á skipinum saman við einum donskum næmingi og einum donskum lærara. Meðan vinnarin er á ferð, skal hann yvir internetið greiða øðrum skúlanæmingum, sum eru heima í Føroyum frá, hvat tey uppliva og læra á ferðini.




# Nær loysa føroyingar og grønlendingar…

KVØLDSETA

Norðuratlantsbólkurin á Fólkatingi vitjar í Føroyum frá 16. til 17. august, og í tí sambandi verður skipað fyri kvøldsetu á REX hóskvøldið kl. 19 við fólkatingslimunum Kuupik Kleist, Lars-Emil Johansen og Høgna Hoydal, og føroyska varamanninum á Fólkatingi, Tórbirni Jakobsen.

Harumframt kemur tónleikarin Uni Debes at spæla nøkur løg.

Unga Tjóðveldið og Tjóðveldisflokkurin skipa fyri tiltakinum, sum fer at viðgera spurningin »Nær verða Føroyar og Grønland sjálvstøðugar tjóðir.«




## Starvsfólk til KT-deildina

Søkt verður eftir starvsfólki til KT-deildina hjá Atlantic Airways.

**Arbeiðið fevnir m.a. um:**

- Menning av skipanum og mannagongdum
- Viðlíkahald av netinum, skráum og kervinum o.a.
- Upplæring, vegleiðing og skipan av skeiðum fyri brúkarum
- Fyrireika innkeyp av telduútbúnaði og aðrari skristovuútgerð

**Krøv**
Tað er ein fyrimunur, um umsøkjarin:

- hevur hollan praktiskan kunnleika umframt útbúgving innan økið
- hevur evni at samstarva og er ágrýtin
- kann arbeiða sjálvstøðugt
- kann arbeiða undir trýsti

Vit bjóða eitt áhugavert starv við stórum og fjølbroyttum avbjóðingum og møguleika fyri fakligari og persónligari menning í einum góðum og dynamiskum umhvørvi.

Nýggja kt-starvsfólkið skal setast skjótast gjørligt, og setanartreytir verða avtalaðar nærri við setan.

Skrivlig umsókn við møguligum prógvum og viðmælum skal vera okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin 24. august 2006. Nærri upplýsingar kunnu fáast um starvið hjá Reidar Ole-Jacobsen, KT-leiðara, á tlf. 34 10 00 ella e-mail: reidar@atlantic.fo.

Umsóknin skal sendast til:
Atlantic Airways, Steinbjørn Hardlei, starvsfólkaleiðara, Vága floghavn, 380 Sørvágur

www.sansir.fo

Atlantic Airways er ein altjóða fyritøka við heimstaði í Sørvági. Umleið 180 fólk starvast í føroyska tjóðarflogfelagnum, og árligi umsetningurin var 378 milliónir krónur í 2005. Atlantic Airways hevur seks flogfør og tvær tyrlur undir sínum veingjabreiði. Flogførini røkja rutusamband úr Føroyum til ymsar býir í Danmark og grannalondunum Onglandi, Skotlandi, Hetlandi, Íslandi, Grønlandi og Noregi. Virksemið veksur í øðrum londum, og umleið ein triðingur av inntøkunum kemur úr útlondum. Tyrludeildin røkir ferðasamband til útoyggjarnar, leiti- og bjargingartænastu og off-shore flúgving í Norðurhøvum.

ATLANTIC AIRWAYS

Atlantic Airways ger tað stuttligari at liva í Føroyum | www.flyfaroe.com